# Lítil hugur til íverksetan



Misálit, verri fíggingarmøguleikar og verri tíðir. Búskaparliga afturgongdin kann nú avlesast í huginum at stovna nýggjar fyritøkur. Talið á nýggjum fyritøkum í Danmark í desember 2008 minkaði við 20% í mun til undanfarna ár. Tað framgongur í eini nýggjar uppgerð hjá danska hagfrøðistovninum, Danmarks Statistik. Samlað fyri 2008 var talan um eitt fall upp á 8,6% av nýstovnaðum fyritøkum, í mun til undanfarna ár. Viðmerkjast skal, at 2007 var eitt metár við sera stórum hugi at seta egna fyritøku á stovn. Hetta árið vóru stovnaðar 29.870 nýggjar fyritøkur, meðan talið í 2008 liggur á sama støði sum 2006. Av uppgerðini framgongur, at stígur kemur í at seta fyritøkur á stovn seinna hálvár 2008, samstundis sum danska vinnulívið hevur met í húsagangum.

# Vánaliga partabrævaárið ávirkar roknskapir

**Fleiri føroysk partafeløg høvdu eitt framúr gott úrslit í fjør, tí kursirnir á teimum partabrøvum, sum feløgini áttu í øðrum feløgum, vóru høgir við ársenda 2007. Nú 2008 er farið afturum, ber til at staðfesta, at soleiðis verður ikki hesaferð, tí flestu skrásettu feløg lógu í botni hetta ársskiftið**



*Feløg, sum áttu partabrøv í eitt nú Atlantic Petroleum við ársenda í 2007, kundu tá gera roknskaáin upp til kurs 2000. Hesaferð máttu partabrøv av hesum slagi gerast upp til kurs 575*

FYLGJUR
*Leif Láadal*
*leif.laadal@gmail.com*

Tá hugt verður at roknskapum fyri 2007, eru fleiri feløg, sum høvdu stórt yvirskot, sjálvt um sjálvur raksturin ikki var so góður. Hjá summum skyldast góða úrslitið serligar umstøður, meðan fleiri teirra høvdu stórar fíggjarligar inntøkur av partabrøvum – serliga partabrøvum í føroyskum fyritøkum.

Um nakrar mánaðir fara vit at byrja at síggja roknskapir hjá føroyskum partafeløgum fyri 2008, og tað er einki at ivast í, at fíggjarligu inntøkurnar ikki verða nær í námind tær somu hesaferð, meta bæði Arnfinur Gudjónsson frá Føroya Banka og Sverri Justinussen frá Eik Banka.

- Taka vit til dømis Atlantic Petroleum, sum fleiri føroysk feløg eiga í, so var kursurin umleið 2000 við árskiftið 2007/08, meðan hann í løtuni liggur á umleið 600. Hetta merkir, at feløgini hava mist tveir triðingar ella gott tað upp á hesi partabrøv, um tey ikki blivu seld í 2008, sigur Arnfinn Gudjónsson, íløguráðgevi hjá Føroya Banka.

## Atlantic Airways

Summi av teimum feløgum, ið eru skrásett á virðisbrævamarknaðinum, eiga eisini partabrøv hjá hvør øðrum. Eitt av teimum er Atlantic Airways, sum hevur átt nógv í Atlantic Petroleum, men Sverri Justinussen, leiðari hjá Eik Markets, vísir á, at føroyska flogfelagið seldi ein part av sínum partabrøvum í oljufelagnum í fjør, so ávirkanin verður ivaleyst ikki so stór, sum hjá teimum feløgum, ið framvegis hava øll tey partabrøv, sum tey áttu 31. desember 2007.

Av feløgum, sum ikki eru skrásett á virðisbrævamarknaðinum, kann NEMA nevnast. Hetta felag hevði eitt risayvirskot í 2007, og stavaði tað einamest frá fíggjarinntøkum. Hevur felagið ikki selt partabrøv í fjør, verður tað torført at fáa inntøkur á hesi konto hesaferð, tí partabrøv bæði her heima og uttanlands eru minka niður í eina helvt í virði í miðal.

pening, um tey eru noydd at selja við tapi. Mann skal tó hava í huga, at partabrøv, sum eru keypt fyri ein hægri kurs enn tað, sum hann er í dag, ikki kunnu sigast at hava veruligt tap, fyrr enn tey eru seld. Inntil tá, er talan um órealiserað tap, tó at partafeløg skulu gera tapið upp í roknskapi sínum (sjá grein aðrastaðni her á síðunum).

Tær royndir, sum føroyskir íleggjarar hava fingið av 2008, mugu sigast at vera, at tað finst eingin løtt loysn, og vandin fyri tapi er altíð til staðar.

Sjálvt um Sverri Justinussen hevur bestan hug at gloyma partabrævaárið 2008, so fer hetta árið tó at hava við sær, at føroyingar gerast betri partabrævaíleggjarar, metir hann.

- Økti áhugin fyri partabrøvum í Føroyum varð drivin fram av føroyskum partabrøvum, men tað er altíð vandamikið at leggja ov nógv egg í somu kurv, so um ikki annað, so hevur 2008 lært nógvar føroyingar at spjaða vágan – ikki bara á ymisk feløg, men eisini ymiskar vinnur, ymisk lond og kanska ikki minst ymisk tíðarskeið, sigur leiðarin fyri Eik Markets.

### Nú er kanska løtan

Brúkar ein íleggjari allan pening sín, so er einki eftir til íløgur, um kursurin lækkar. Tí er tað altíð gott at hava eitt sindur eftir. Og júst í hesum døgum kann tað loysa seg at keypa partabrøv, metir Sverri Justinussen.

- Eg rokni ikki við, at vit hava sæð tær ringastu avleiðingar av fíggjarkreppuni enn, men marknaðurin hevur tað við at vera framman fyri. Tískil eru kursirnir í fleiri førum lægri enn teir eiga at vera, tí íleggjarar meta, at tíðirnar fara at gerast eitt sindur verri. Tað merkir so hinvegin, at tað eigur at bera til at gera góðar íløgur nú, men ikki fyri allan peningin, tí tað er gott at hava eitt sindur at keypa fyri, um kursirnir lækka enn meira komandi hálva árið, sigur Sverri Justinussen.

Eins og nógv onnur, sum fylgja væl við búskapargongdini, metir Sverri Justinussen, at tað fer at lýsa á partabræva-himmalinum, tá helmingurin, ella gott tað, er farið av árinum.

### Áhugin er framvegis stórur

Sjálvt um partabrævaárið 2008 var eitt av teimum vánaligastu í nýggjari tíð, so hava fólk ikki mist áhugan fyri partabrævahandli, sigur Arnfinn Gudjónsson, íløguráðgevi í Føroya Banka.

- Talið á handlum er í løtuni ikki so høgt, sum tað var fyri einum ári síðani, men fólk eru framvegis sera áhugað í partabrævahandli, og tey spyrja nógv til marknaðin, sigur hann.

Fíggjarkreppan og lækkandi kursir hava eisini havt tað við sær, at føroyingar hava broytt íløgumynstur.

- Tað góða við kreppuni, um mann so kann siga, er at tað er lættari hjá okkum at ráðgeva føroyingum nú, tá tað snýr seg um at spjaða vága, og gera íløgur í annað enn føroysk partabrøv, sigur Arnfinn Gudjónsson.

Fyri einum ári síðani og gott tað, vildu teir flestu einstøku føroyingar, sum júst vóru byrjaðir at handla, bara hava føroysk partabrøv. Men soleiðis er ikki longur. Í dag uppliva tey bæði í Føroya Banka og Eik Banka, at áhugin fyri útlendskum partabrøvum er vaksandi.

Tá vit tosa um feløg, ið gera íløgur í partabrøv, ella pensjónspengar ið skulu plaserast, eru serligar reglur galdandi, har tað ikki er loyvt at eiga meira enn 20% av somu partabrøvum (sama felag) í partabrævagoymsluni. Í teimum førum hevur tað tí verið neyðugt at hugt útum Føroyar.

---

**FAKTA**

Bank og International Settlements (BIS)
Basel, Sveits
Altjóða stovnur, sum hevur havt eftirlit við flytingum o.ø.
Eftir fíggjarkreppuna, eru røddir nú frammi, sum krevja, at stovnurin skal hava ein meiri stýrandi myndugleika á kapitalmarknaðinum.

at fíggjarkreppan má fara at hava við sær, at altjóða fíggjarkerviðmá endurskoðast. Serliga eru atfinningarsamar røddir, sum siga at eftirlitið í USA og Bretlandi ikki hevur verið nógv gott – Ísland er eisini nevnt í hesum sambandi.

Orsøkin til, at Týskland er betri fyri enn Bretland, og harvið ein betri útflutningsmarknaður fyri Føroyar, er júst at týskarar hava havt strangari eftirlit við sínum kapitalmarknaði, enn hini trý nevndu londini.

– Vit hava sæð, at altjóðagerðin er sligin skjótari ígjøgnum í fíggjarvinnum enn í hinum vinnum, og tað hevur í nógvum førum verið jaligt, men nú hava vit so eisini sæð baksíðuna av hesi menning, og tað krevur, at strangari krøv og størri eftirlit kemur við kapitalmarknaðinum, sigur Johnny í Grótinum.

Hann leggur tó afturat, at krøv og eftirlit ikki skulu køva møguleikarnar at koma víðari.

– Í Íslandi síggja vit t.d. at myndugleikarnir forða fólki í at eiga útlendskan kapital ella keypa útlendsk partabrøv, og tað er kanska ikki gongd leið, tí við altjóðagerðini, ber til at sleppa undan slíkum krøvum. Tá er betri at hava ein stovn sum BIS, sum kann samskipa nøkur altjóða krøv og reglur, sigur Johnny í Grótinum.